# Uttanríkis- og mentamálaráðið

**Lógartænastan**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 23. oktober 2020 |
| Mál nr.: | 20/00638 |
| Málsviðgjørt: | NH/HZH/TH |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

## Kunngerð
## um
## royndir og prógv til vatnskutara

Við heimild í § 2, stk. 2, § 3, nr. 3, § 4, § 6, stk. 1, nr. 1, 2 og 3, § 6, stk. 2 og § 11 í løgtingslóg nr. 55 frá 24. apríl 2001 um útbúgving av manning á skipum o.ø., verður ásett:

*Øki*

**§ 1.** Kunngerðin fevnir um krøvini til vatnskutaraprógv.

*Vavið av royndunum*

**§ 2.** Vatnskutaraprógv gevur rætt til at føra vatnskutara, sambært § 2, stk. 1. nr. 2 í kunngerð nr. 105 frá 15. juli 2019 um krøv til sigling við motorriknum stuttleikafari við skrokklongd undir 4 metrar (Vatnskutarakunngerðin).
*Stk. 2.* Til útvegan av vatnskutaraprógvi er krav um, at viðkomandi skal hava staðið eina ástøðiliga og eina verkliga roynd.
*Stk. 3.* Royndin skal staðfesta, um viðkomandi sum tekur royndina, á tryggan og fullgóðan hátt kann virka á einum frítíðarfari, sum er fevnt av vatnskutarakunngerðini og varða um trygdina á egnum fari við atliti at umhvørvinum. Royndin skal eisini staðfesta um viðkomandi hevur nóg góðan kunnleika til sjóreglur, uppmerkingar av siglingarleiðum, trygd á sjónum, fyribyrging og eldsløkking umborð á minni førum, siglingarreglur og vernd av havumhvørvinum.
*Stk. 4.* Viðkomandi sum tekur royndina skal vísa nøktandi vitan um hesi evnir:

1) Ábyrgdarbýtið umborð
2) Víkiskylda
3) Siglingarreglur á ávísum økjum í nærumhvørvinum.
4) Atburð og trygd við og umborð á farinum, undir hesum tiltøk við eldsbruna, samanstoyt og um siglt verður á land.

*Stk. 5.* Viðkomandi sum tekur royndina skal, við sigling í skikkaðum fari, vísa nøktandi førleikar innan hesi økir:

1) Gera klárt til at sigla
2) At fara frá og leggja at landi

3) Nýtslu av trygdarútgerð
4) Nýtslu av siglingarreglum
5) Tiltøk um persónur fer fyri borð, at bjarga sær sjálvum og øðrum
6) Sigling við skiftandi ferð, stýring og mannerering undir akselerasjón og við høgari og lágari ferð
7) Mannerering við víkiskyldu og neyðsteðg
8) Tryggan atburð og leypandi meting av váðum undir sigling

*Stk. 6.* Persónar, sum hava dugnaskaparprógv til stuttleikabátar undir 20 BT, skulu bert vísa førleikar sambært ásetingunum í stk. 5, fyri at fáa prógv til vatnskutarar.

*Aðrar ásetingar*

**§ 5.** Royndirnar skulu fara fram á góðkendum maritimum skúla.
*Stk. 2.* Skúlin ger eina útbúgvingarætlan, sum landsstýrismaðurin skal góðkenna og hevur eftirlit við. Útbúgvingarætlanin skal eitt nú lýsa innihald, undirvísingartilfar, próvtøku og longd á skeiði.
*Stk. 3* Skúlin skrivar út prógv fyri staðin skeið.
*Stk. 4.* Treytin fyri upptøku til skeiðið er, at viðkomandi er fyltur 16 ár.
*Stk. 5.* Skúlin verður heimilaður at krevja gjald frá hvørjum einstøkum luttakara fyri útreiðslur í sambandi við royndirnar, undir hesum luttøkugjald og gjald fyri prógv.

*Kærur*

**§ 6.** Avgerðir, sum tiknar verða sambært hesi kunngerð, kunnu kærast til landsstýrismannin.
*Stk. 2.* Kærur um avgerðir sambært stk. 1. skulu latast leiðara skúlans til hoyringar. Kærarin skal hava høvi at gera viðmerkingar til hoyringarsvarið frá leiðara skúlans í seinasta lagi 7 dagar frá tí degi, at leiðari skúlans skrivliga hevur fráboðað hoyringina fyri kæraranum.
*Stk. 3.* Leiðari skúlans sendir kæruna, hoyringarsvarið og møguligar viðmerkingar frá kæraranum til landsstýrismannin.
*Stk. 4.* Freistin at kæra avgerðir sambært stk. 1 er 2 vikur frá tí degi, avgerð skúlans skrivliga er fráboðað kæraranum.
*Stk. 5.* Kærur um próvtøkur og próvtøkuviðurskifti annars skulu viðgerast sambært kunngerð um próvtøkuskipan fyri maritimar útbúgvingar.

*Gildiskoma*

**§ 7.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Uttanríkis- og mentamálaráðið, dagfesting

**Jenis av Rana**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Skjal 1**

# Heitið á skjalinum